


www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 09 - 2012

# Statoil við risastórum ætlanum

Statoil-stjórin, Helge Lund, var í góðum hýri, tá hann fór á røðarapallin á Rica-hotellinum í Holmenkollen í morgun, og honum líkt legði hann fyri á ein skemtiligan hátt. -Satt at siga var eg eitt sindur ímóti at luttaka her. Tit mugu ikki misskilja meg, men hvørja ferð eg eri her, hendir okkurt skelkandi á marknaðinum. Tá eg hevði verið her í 2008, fór Lehman Brothers av knóranum, og tá eg seinast var her í 2010, var tað kreppan í Grikkalandi. Og satt at siga veit eg ikki, hvat vit kunnu vænta okkum, nú eg eri aftur her, segði Statoil-stjórnin. Men so kom hann við einum stórtíðindum. -Vit hava sett okkum eitt nýtt mál. Vit fara at hækka okkara "recovery rate" (oljan, sum fæst upp úr undirgrundini) frá 50 til 60 prosent, segði Lund. Við øðrum orðum skal parturin av útvunnari olju økjast úr 50 prosentum í 60 prosent. Frá 2010 til 2011 økti Statoil sítt útvinningarstig av teirri samlaðu oljugoymsluni frá 49 til 50 prosent. Eitt prosent svarar til 327 milliónir tunnur av olju, og verður tað útvunnað gassið lagt afturat, svarar eitt prosent størri útvinningarstig til tað, sum í mesta lagi kann fáast burtur úr oljuleiðunum Skrugard og Havis. Við øðrum orðum snýr ætlanin hjá Statoil-stjóranum um at økja útvinningina av olju tríggjar milliardir tunnur - umframt gass, skrivar Aftenbladet. Statoil leggur støðugt størri dent á at fáa meiri burtur úr oljuleiðunum, og felagið hevur í løtuni 3.000 starvsfólk, sum einans arbeiða við at økja útvinningarstigið. Harumframt arbeiðir felagið við at stovna eina nýggja granskingarmiðstøð, hvørs einasta uppgáva verður at økja útvinningina. ? ?